# Roknskapur fyri 1. hálvár 2000

| 1.ooo kr. | 2000 | 1999 |
|---|---|---|
| Rentuinntøkur | 9.084 | 7.719 |
| Rentuútreiðslur | 3.384 | 3.173 |
| **Rentuinntøkur netto** | **5.700** | **4.746** |
| Vinningsbýti av partabrøvum | 0 | 52 |
| Kostnaður, provisjónir v.m. | 834 | 734 |
| **Rentu- og kostnaðar inntøkur netto** | **6.534** | **5.532** |
| Virðisjavnan av virðisbrøv og gjaldoyra | -401 | -1.139 |
| Aðrar inntøkur | 28 | 138 |
| **Úrslit av fíggjarpostum** | **6.161** | **4.531** |
| Útreiðslur til starvsfólk, umsiting o.a. | 4.587 | 3.884 |
| Avskrivingar av ognum | 449 | 267 |
| Aðrar rakstrarútreiðslur | 76 | 437 |
| Avskrivingar og burturleggingar av skuldarum (netto) | 617 | -198 |
| **Úrslit av vanligum rakstri** | **432** | **141** |
| Eyka inntøkur | 0 | 0 |
| Eyka útreiðslur | 0 | 0 |
| **Úrslit áðrenn skatt** | **432** | **141** |

# Fíggjarstøða 30. juni 2000

## Ogn

| | | |
|---|---|---|
| Kassapeningur og innistandandi í tjóðbankum | 2.748 | 2.975 |
| Ogn hjá fíggjarstovnum | 24.305 | 20.926 |
| Útlán | 210.621 | 184.734 |
| Lánsbrøv | 57.046 | 60.870 |
| Partabrøv | 551 | 517 |
| Ítøkiligir ognir | 4.604 | 3.881 |
| Aðrar ognir | 142 | 40 |
| Tíðaravmarkingar | 0 | 229 |
| **Ogn tilsamans** | **300.017** | **274.172** |

## Skuld

| | | |
|---|---|---|
| Skuld til fíggjarstovnar | 1.949 | 3.741 |
| Innlán | 263.941 | 236.789 |
| Onnur skuld | 1.829 | 2.731 |
| Tíðaravmarkingar | 0 | 33 |
| Úrslit higartil í ár | 432 | 141 |
| Eginogn | 31.866 | 30.737 |
| **Skuld tilsamans** | **300.017** | **274.172** |

**Tøl, ið ikki eru við í fíggjarstøðuni**

| | | |
|---|---|---|
| Ábyrgdir | 3.805 | 2.947 |

SUÐUROYAR SPARIKASSI

Sosialurin - 311820




**Honda Accord 2,0 EXI**

til sølu. Prísuppskot min. 110.000 kr. Við fylgir: nýtt Pioneer stereoanlegg virði 20.000 kr., sportsfelgur við dekkum umframt fýra nýggj dekk, originalfelgur við skálum.

**Tlf. 216460 og 221319**

Original
bosal
Útstoyt



ES
p/f Esmar Simonsen
Kambsdalur
FR-530 Fuglafjør›ur
Tlf. 444405
Fax444629

KIA CARNIVAL
2.9 Dohc Turbo-Diesel16 V, 126 HK, 5 hurðar



Rætti bilurin til mong endamál.
Pláss fyri 7 fólkum og hópin av viðføri.
D. B. Bilar
Tel. 310 600

Sosialurin - 311820

Brúðarlín
v/ Anniku Gaard
Fagralíð 22
Tlf./Fax. 314281
Brúðar- og brúðargentukjólar við tilhoyri til leigu
Nýggir kjólar kunnu útvegast


# Keyp myndir

Nú er møguleiki at keypa myndir sum standa í Sosialinum





**Kostnaður pr. stk. fyri litmynd:**

| | |
|---|---|
| 10x15 cm. kr. 80,- | 18x24 cm. kr. 150,- |
| 13x18 cm. kr. 100,- | 20x30 cm. kr. 200,- |
| 15x21 cm. kr. 130,- | 30x45 cm. kr. 350,- |

Fyll henda lepan út.
Klipp myndina út og send hana saman við lepanum til Sosialin.

**Tíðindablaðið Sosialurin
Box 76
110 Tórshavn**

Blað nr.: ____
Síða: ____
Stødd: ____
Mongd: ____

Navn: ____
Bústaður: ____
____
Telefon: ____





Leverandørurin til entreprenørar í 28 ár... Tosið við okkum!
Kaj Andreasen & Co
Sandvíkarhjalli - Tel. 315600 - Fax 318008

www.wenzel.fo
Ford



P/f Wenzel




Viðmerkingar

# Almennur fyrispurningur til Helenu Dam á Neystabø landsstýrismann

**Helena Dam á Neystabø hevur nú so ofta prógvað, at hon misskilir sína uppgávu sum landsstýrismaður. – Sjálvstýrisflokkurin letur eyguni aftur fyri vanvirðing hennara av pørtum av hennara umsitingarøkjum.**



Eg fari við hesum at vísa á tvinnar samrøður, Helena Dam á Neystabø, landsstýrismaður í føroyska heilsuverkinum, hevði við Dimmalætting. – Onnur stóð í blaðnum 13. mai í ár og hin 26. august, eisini í ár.

Báðar greinirnar viðgjørdu sama evni, nevniliga sjúkraflutningsbilar. Greinin í mai var um sjúkraflutningsbil á Klaksvíkar Sjúkrahúsi, og í august viðgjørdi hon sjúkraflutningsbil, sum Landssjúkrahúsið hevur ábyrgd fyri.

Hon sigur um bilin á Klaksvíkar Sjúkrahúsi 13. mai í ár soleiðis: »At Klaksvíkar Sjúkrahús ikki hevur prioriterað sjúkrabilarnar nóg høgt kann ongantíð verða mín trupulleiki«. – Tað vil siga, at hann skal haldast innan fyri játtanina, sum hon sjálv vildi hava at vera 2.2 mill. kr. lægri enn løgtingið samtykti.

Um bilin, sum Landssjúkrahúsið hevur ábyrgd fyri, sigur hon 26. august soleiðis: »Vit væntaðu, at sjúkrabilparkin fór at klára seg, men ein billur megnar ikki meir. Men pláss er ikki fyri einum nýggjum sjúkrabili við inniverandi játtan. Tí má ein bráðfeingis játtan fáast til vega. Og hetta verður ikki greitt fyrr enn í næstu viku«. – Við øðrum orðum, tað gerst ikki við, um hann ikki er á játtanini, vit skulu bert finna eina eykajáttan.

Mær tykir okkara landsstýrismann í heilsumálum at gerast frekari og frekari, og umframt allar trupulleikar, hon hevur vavt seg inn í á øðrum økjum, fær hon sær nýggjar trupulleikar. – Her tykist ikki nakað mark at vera fyri.

Eingin ivi er um, at hon hevur misskilt sína uppgávu, fyri ikki at siga misrøkt hana.

Tí seti eg hesar spurningar, sum eg ynski svar uppá í bløðunum – og fái eg ikki svar her, so verða teir settir meira nágreiniliga í tinginum.

*1. Hvør er munurin á einum sjúkraflutningsbili á Klaksvíkar Sjúkrahúsi og á Landssjúkrahúsnum?*

*2. Eigur landsstýrismaðurin í heilsumálum ikki at vera landsstýrismaður fyri bæði Klaksvíkar Sjúkrahús og Landssjúkrahúsið?*

*3. Hvussu kann ein landsstýrismaður í tveimum eins málum útleggja annað sum »vánalig prioritering, sum ongantíð kann vera landsstýrismansins trupulleiki«, meðan tá talan er um annað sjúkrahús, so »má hon syrgja fyri at finna henda pening við eini eykajáttan, men, at tað ikki kann verða klárt fyrr enn um einar 14 dagar«?*

Norðoyingar og føroyingar annars ynskja hesar spurningar svaraðar.

Eisini kundi eg hugsað mær at vitað, hvat partamenninir Eyðun Elttør, Sámal Petur í Grund og Jákup Sverri Kass og fyri alt tað sjálvstýrisflokkurin siga um hesa vanvirðing av einum stovni sum Klaksvíkar Sjúkrahúsi og starvsfólki teirra.

**Jógvan við Keldu
løgtingsmaður**

# Dagligur leiðari í Sjónleikarhúsinum

Hesi seinastu árini hevur Havnar Sjónleikarfelag verið sera virkið. Umframt fleiri leikuppsetanir á hvørjum ári, gevur Sjónleikarhúsið nógvum øðrum og fjølbroyttum tiltøkum innivist, umframt at hýsa sjónleikarskúla fyri børnum og øðrum skeiðvirksemi. - At leggja til rættis og samskipa øll hesi tiltøk er sera orku- og tíðarkrevjandi, og hjá nevndini, sum øll hesi árini hevur tikið sær av hesum arbeiði, hevur tørvurin á einum dagligum leiðara leingi verið eyðsýndur. Tí hevur nevndin nú gjørt av at seta eitt fólk at taka sær av hesum burturav.

1. september 2000 byrjar Birita Krossteig í starvi sum dagligur leiðari hjá Havnar Sjónleikarfelag og í hesum sambandi verður móttøka í Sjónleikarhúsinum fríggjadagin, hin 1/9 kl. 14-16.

# Stórtíðindi frá Leikpalli Føroya

9 handrit komu inn til leikritakappingina, sum Leikpallur Føroya bjóðaði til á vári 1999. Virðislønin er kr. 100.000.

Dómsnevndin er um at vera komin undir land við dømingini og mánadagin 4. sept. verður avdúkað, hvør vinnarin er.

Í dómsnevndini sita: Helga Hjørvar, Olaf Johannessen og Vár B. Jacobsen.

Tey í stýrinum fyri Leikpall Føroya eru sera væl nøgd við stóru undirtøkuna, og spennandi verður at síggja úrslitini aftur á leikpøllum kring landið í komandi tíðum.

# Framtíðin hvarv – Støðan hjá heilaskaddum í Føroyum

Seinastu 5-6 árini havi eg nýtt meginpartin av tíð míni, bæði arbeiðstíð og frítíð at arbeiða við heilaskaddum í Danmark og tað er gleðiligt at síggja, at danir at enda hava tikið stöðuna hjá teimum heilaskaddu í álvara. Men enn er langt á mál, tí danska heilsuverkið er ikki innrættað til eina longri afturvenjing, men mest til bráfengis hjálp og uppihald á röktarheimi o.tl.

Seinastu mánaðirnir hevur so staðið mær í boðið at arbeiða við føroyingum sum hava fingið heilaskaða, men eru sendir til Danmarkar til afturvenjingar. Hetta er sera spennandi, og tað hevur stóra ávirkan tá teir síggja, at tað er ein øðiligur munur á afturvenjingini alt eftir um føroyingarnir eru saman við dönum ella saman við øðrum føroyingum. Hetta er nú ikki so løgið, tí vit skilja hvör annan nógv betri, og heilaskaðin ger jú eisini, at tað ofta er trupult at siga tað, ein hugsar. At skulla siga tað á donskum ger tað ikke lættari. Og so er tað mentanin og alt tað ósagda.

Men hvussu so tá føroyingarnir skulu heimaftur til Föroya? Hvar er framtíðin? Og hvørji eru framtíðar útlitini? Har er eingin framtíð — hon er horvin!

Hvørt tað er vantandi kunnleiki, vantandi vilji ella eitt ótal av fordómum um heilaskadd, ella kanska óviljin móti tí, at føroyingarnir hava verið til afturvenjingar í Danmark — ella tað er ein samanseting av øllum sum ger, at tey onga framtíð hava í Føroyum ber ikki til hjá mær at siga. Men so mikið kann eg siga: Arbeiðið við heilaskaddum í Føroyum er ikki samskipað. Har er eingin sum hevur høvuðsábyrgdina og har er eingin heilaskaðasamskipan av nøkrum slag. Felögini eru fleiri, hóast eitt felag hevði verið ríkiligt.

Tað eg fyrst og fremst vil við hesum stutta skrivi er: At fáa samband við heilaskadd í Føroyum og avvarandi teirra og at fáa tey at vekja eitt orðaskifti sum aftur kann vekja politikarar og ábyrgdarfólk soleiðis, at Føroyar eisini leggur dent á at geva teim heilaskaddu bestu møguleikarnar.

Eg fari seinni at greiða eitt sindur meiri frá hvat ein heilaskaði er, hvat skaðin ger við tann skadda og hví, vit ikki kunnu sammeta heilaskadd við tey, sum eru född við einum breki. Tað er einki sum er skeivari enn júst tað. Heilaskadd hava eitt heilt lív áðrenn skaðan, og tey eru sum oftast eins klók og áðrenn skaðan. Tey hava hinvegin ofta trupulleikar at siga tað tey ætla — siga ofta okkurt annnað, og tey hava ofta ilt við at halda skil á degi og lívi. Tey hava stuðul og hjálp fyri neyðini, men tað skal fyrst og fremst vera stuðul sum miðjar ímóti at tey aftur skulu gerast so sjálvbjargin sum til ber.

Eg frætti meiri enn fegin frá einum hvørjum sum antin sjálv/ur hevur ein heilaskaða ella frá avvarandi hjá heilaskaddum. Hetta er sera neyðugt skal tað vera møguligt at gera støðuna upp.

Skriva til: Dansk HjerneskadeForum, Vingetoften 18, DK 2730 Herlev — Danmark

Ella send epost til:
neozone@neozone.dk
ella
hjerneskade@neozone.dk

Vinarliga heilsan
N-Jón Ellendersen
Dansk Hjerneskadeforum
Vingetoften 18, 2730 Herlev, tlf. 44 84 265 ella 24430903

# Oljuráðstevna í Norðurlandahúsinum

**Føroya Arbeiðsgevarafelag metur, at tað hevur stóran týdning, at útlendskir veitarar sum skjótast skilja teir karmar, sum lagdir eru um oljuvinnuna í Føroyskum øki og tí verður oljuráðstevna í oktober**

Í seinasta tíðindaskrivi frá Vinnuhúsinum, verður greitt frá oljumessuni, sum í farnu viku var í Stavanger, har føroysku virkini hittu útlendskar veitarar sum virka innan oljuvinnuna. Í fleiri førum royna føroysku feløgini at finna samstarvsfelagar, tí eyðsæð er, at fleiri uppgávur verða torførar at loysa. Virkini mangla enn royndir og vitan innan hetta ógvuliga specialiseraða økið, skrivar Vinnuhúsið.

– Meðan oljufeløgini hava skilt, at ásetingarnar í loyvistreytunum um føroyska vinnuliga luttøku og førleikamenning av føroysku vinnuni, skulu takast í álvara, so sínast útlendsku veitarar teirra ikki at hava skilt hetta.

– Nakrir av stóru veitarunum hjá oljufeløgunum ímynda sær ikki at føroysk vinna fær nakran leiklut. Teir ætla sær til Føroya at loysa uppgávuna sjálvir, ella at arbeiða út frá Noreg ella Skotlandi og bert hava ein agent í Føroyum. Teir hava kanska skilt, at veitingarnar skulu um føroyskan bryggjukant, men ikki, at dentur verður lagdur á veruligt føroyskt innihald í veitingunum, og at føroyska vinnan skal mennast soleiðis, at hon áhaldandi kann átaka sær størri leiklut og loysa alt størri uppgávur.

**Uppbyggja**

– Føroya Arbeiðsgevarafelag metur, at tað hevur stóran týdning, at útlendskir veitarar sum skjótast skilja teir karmar, sum lagdir eru um oljuvinnuna í Føroyskum øki, og felagið ætlar at gera sítt til, at boðskapurin verður skiltur. Oljufeløgini hava tó eisini ábyrgd av, at undirveitarar teirra fáa vitan um tær treytir, sum teir koma at virka undir. Í síðsta enda eru tað oljufeløgini sum verða mett eftir, um teirra virksemi skapar eina virðisøking í Føroyum.

– Síðst í oktobur verður skipað fyri einari oljuráðstevnu í Norðurlandahúsinum, har útlendskir veitarar innan oljuvinnuna verða bodnir við. Eitt av endamálunum við hesari stevnu er júst tað, at hesir gerast greiðir yvir, at føroysk vinna ætlar sær at spæla ein týðandi leiklut, og at myndugleikarnir hava lagt karmarnar til rættis við hesum fyri eyga.

– Føroya Arbeiðsgevarafelag ynskir at oljan skal gerðast ein møguleiki hjá føroyskum fyritøkum at uppbyggja førleika og tøknifrøðiligan serkunnleika. Vit ynska ikki, at leiklutur okkara bert verður agentvirksemi.